# *Samandráttur av Bygdaráðsfundi 01.09.2014*

**Bygdaráðsfundur 01.09.2014 kl. 16.00 til kl. 19.00**

| | | |
|---|---|---|
| Fundarstað: | Fundarhøli | |
| Hjástødd: | Jóhannus Danielsen | x |
| | Súni í Hjøllum | x |
| | Elin á Torkilsheyggi | x |
| | Niclas Davidsen | x |
| | Mortan Højgaard | x |
| | Jákup Olsen | x |
| | Súnfríð Jacobsen | forfall |
| | Marjun Gaardbo, skrivari | x |

**Til viðgerðar:**

**Mál nr. 77/2014 Fíggjarmál**
J.nr. 2012-0031-0132
**Málslýsing**
Onnur viðgerð av fíggjingini viðv. samskipan av fyrireikan av yvirtøku av eldraøkinum

Í sambandi við yvirtøku av eldraøkinum hava kommununar í Skálafjarðarsamstarvinum sett ein samskipara í starv til at fyrireika yvirtøkuna. Samskiparin er komin við einum fíggjaryvirliti, sum er ein meting av útreiðslum til fyrireikingina av yvirtøkuni av eldraøkinum, frá 1. juni 2014 – 31. desembur 2014.

Samlaði kostnaðurin er kr. 530.414,00, býtið millum kommunurnar er eftir fólkatalinum, og er parturin hjá Nes kommunu kr. 109.600,00, svarandi til 20,66 %.

**Tilmælið**
Á fundi 17.06.2014 mælir Fíggjarnevndin til at taka undir við fíggjaryvirlitinum frá samskiparanum, og at peningurin verður tikin av stovninum Barnavernd.

**Avgerð**
Tilmælið frá Fíggjarnevndini var eimælt samtykt á bygdaráðsfundi 23.06.2014.

**Tilmælið**
Á fundi 26.08.2014 mælir Fíggjarnevndin til at taka undir við aðru viðgerð,
av fíggjaryvirlitinum frá samskiparanum.

**Avgerð**
Tilmælið frá Fíggjarnevndini var einmælt samtykt.

# *Samandráttur av Bygdaráðsfundi 01.09.2014*

**Mál nr. 78/2014 Fíggjarmál**
J.nr.2014-0044-0073
**Málslýsing**
Onnur viðgerð av kostnaðinum av vegagerð norður frá Gaddavegnum.

Frá Gaddavegnum og norður til sethúsini á matr. nr. 655a er ein vegastubbi á 80 m, sum ikki er asfalteraður. Í teir norðastu 40 m eru allar leiðingar lagdar, meðan teir 40 m norður frá svinginum ikki eru gjørdir.

Arbeiðið, sum eftir er at gera soleiðis, at vegurin verður liðugur er:
1. Planera frá svinginum, umleið 40 m norður, tað verður í høvuðsheitum uppgrevstur og uppfylling av nýggjum tilfari.
2. Regnvatnsristir við tilhoyrandi brunnum og leiðingum.
3. Tvørrennu í vegin við st. 30
4. Asfaltering frá svinginum og norð til markið matr. nr. 655a, umleið 75 m

Kostnaðarmeting fyri planering og regnvatnsleiðingar er kr. 100.000,00 u/mvg og fyri asfaltering (uttan kantsteinar) kr. 180.000,00 u/mvg, tilsamans kr. 280.000,00 u/mvg.

**Tilmælir**
Á fundi 10.06.2014 mælir Tekniska nevnd til, at vegurin, uppá umleið 40m norðureftir, og har kostnaðarmetingin er kr. 100.000,00 u/mvg, verður gjørdur liðugur, áðrenn hann kann asfalterast.

Á fundi 17.06.2014 tekur Fíggjarnevndin undir við tilmælinum hjá Teknisku nevnd, at vegurin, har kostnaðarmetingin er kr. 100.000,00 u/mvg, verður gjørdur, og at peningurin verður tikin av stovninum Havnin.

**Avgerð**
Tilmælið frá Fíggjarnevndini og Teknisku nevnd var eimælt samtykt á bygdaráðsfundi 23.06.2014.

**Tilmælið**
Á fundi 26.08.2014 mælir Fíggjarnevndin til at taka undir við aðru viðgerð,
at vegurin uppá umleið 40 m verður gjørdur.

**Avgerð**
Tilmælið frá Fíggjarnevndini var einmælt samtykt.

**Mál nr. 79/2014 Vegamál**
J.nr.2013-0044-0069
**Málslýsing**
Viðgerðarheimið, sum Blái krossur hevur latið bygt úti á Nesi, við Pætursús, er nú liðugt, og skal eftir ætlan takast í nýtslu 19. septembur.

Í tí sambandi hevur bygginevndin fyri Viðgerðarheimið ynski um, at Nes kommuna ger atkomuvegin, sum er ein kommunalur vegur, lidnan áðrenn heimið verður tikið í nýtslu.

Tekniska deild hevur mett um arbeiðið av at gera atkomuvegin og hevur gjørt eina kostnaðarmeting. Mett verður, at arbeiðið kemur at kosta 339.600 uttan mvg, og tá umfatar arbeiðið:

- Grava opna veit og tilevna skráan omanfyri vegin
- Regnvatnsleiðing frá veitini og omanum vegin
- Planering av vegøki omanfyri bygningin
- Kantsteinar í niðaru síðu á vegnum
- Asfaltering av vegnum

Fundur hevur verið millum umboð frá Nes kommunu og Teknistovuna í Gøtu, sum er ráðgevi hjá Bláa krossi í samband við bygging av Viðgerðarheiminum.

Bygginevndin fyri Viðgerðarheimið hevur boðað Nes kommunu frá, at sum partur av teirra arbeiði av uttanumøkinum hjá Viðgerðarheiminum, vil hon átaka sær at gera atkomuvegin fyri Nes kommunu fyri kr. 150.000 uttan mvg, í samráð við teknisku deild hjá Nes kommunu.

**Tilmælið**
Á fundi 19.08.2014 mælir Tekniska nevnd til at taka av tilboðnum frá bygginevndini fyri Viðgerðarheimið at gera arbeiðið av kommunala atkomuvegnum fyri kr. 150.000 uttan mvg.

Á fundi 26.08.2014 tekur Fíggjarnevndin undir við tilmælinum frá Teknsiku nevnd, og at arbeiðið verður fíggjað soleiðis, at kr. 100.000 verða tiknar av íløgukontuni moldgoymslan, og kr. 50.000 av rakstrarkontuni, kavarudding.

**Avgerð**
Tilmælini frá Teknisku nevnd og Fíggjarnevndini vóru einmælt samtykt.

**Mál nr. 80/2014 Havnamál**

J.nr. 2012-003-0019

**Málslýsing**

Í skrivi 23.06.2014 søkir havnameistarin, sum er í farloyvi, um at fáa longt sítt farloyvi við einum ári frá 01.08.2014 at rokna.

**Tilmælið**

Á fundi 19.08.2014 mælir Tekniska nevnd til at halda fast við samtyktina, frá 13.05.2013 um, at farloyvið ikki verður longt.

**Avgerð**

Tilmælið frá Teknisku nevnd var einmælt samtykt.

**Mál nr. 81/2014 Jarðarmál**

J.nr. 2014-0042-0330

**Málslýsing**

Í skrivi 14.07.2014 sendir Búnaðarstovan umsókn frá Kjartan Højgaard, um uppískoytisstykki, til ummælis hjá kommununi.

Uppískoytisstykkið er 260 m² til støddar og er burturav matr. nr. 405 Tofta bygd. Uppískoytisstykkið er fyri at vaksa um grundstykkið á matr. nr. 299 Tofta bygd.

**Tilmælið**

Á fundi 19.08.2014 mælir Tekniska nevnd til at viðmæla, at Kjartan Højgaard ognar sær uppískoytisstykkið.

**Avgerð**

Tilmælið frá Teknisku nevnd var einmælt samtykt.

**Mál nr. 82/2014 Vegamál**

J. nr. 2014-0044-0074

**Málslysing**

Hin 22. juli kom áheitan frá borgara við Rókaveg um at fáa sett eina bilverju upp. Tað snýr seg um vegastrekkið við Rókaveg 50.

**Tilmælið**

Á fundi 19.08.2014 mælir Tekniska nevnd til at bilverja verður gjørd á vegastrekkinum við Rókaveg 50. Kostnaðarmetingin frá Teknisku deild, fyri at gera bilverju á Rókavegnum, er kr. 53.000,00 u/mvg.

Á fundi 26.08.2014 tekur Fíggjarnevndin undir við tilmælinum frá Teknisku nevnd, og at peningurin kr. 27.000,00 verða fluttar frá løn vegir til vegir íløga, og kr. 26.000,00 verða fluttar frá umvæling og viðlíkahald til vegir íløga, tilsamans kr. 53.000,00 u/mvg.

**Avgerð**
Tilmælini frá Teknisku nevnd og Fíggjarnevndini vóru einmælt samtykt.

**Mál nr. 83/2014 Byggimál**
J. nr. 2014-0042-0334
**Málslýsing**
Hin 22.07.2014 søkir Jaspur Langgaard um loyvi til at byggja urtagarðsstovu á Gaddavegi 2.

**Tilmælið**
Á fundi 19.08.2014 mælir Tekniska nevnd til at játta byggiloyvi til urtagarðsatovu, eftir innsendu tekning.

**Avgerð**
Tilmælið frá Teknisku nevnd var einmælt samtykt.

**Mál nr. 84/2014 Byggimál**
J.nr. 2014-0042-0335
**Málslýsing**
Í skrivi 11.08.2014 søkir Hans Martin á Regni um loyvi til uppíbygging til sethús síni, matr. nr. 473 á Regnavegi 30.

**Tilmælið**
Á fundi 19.08.2014 mælir Tekniska nevnd til at játta byggiloyvi til uppíbygging, eftir innsendu tekningum.

**Avgerð**
Tilmælið frá Tekniskunevnd var einmælt samtykt.

**Mál nr. 85/2014 Skúlamál**
J.nr.2014-0021-0073
**Málslýsing**
Í skrivi, 20.06.2014, frá leiðsluni við Tofta skúla verður víst á, at teldurnar hjá lærarunum eru vornar gamlar og slitnar. Fleiri av hesum teldum kunnu ikki brúkast í dag.

Uppskot, frá leiðslu skúlans, til fígging av teldunum er: egingjald 1/3, skúlin/blokkurin 1/3 og Nes kommuna 1/3. Talan er um 20-22 teldur.

**Tilmælir**
Á fundi 20.08.2014 mælir Mentanarnevndin til, at nýggjar arbeiðsteldur til lærararnar verða keyptar, og at fíggingin verður sum uppskot frá leiðslu skúlans.

Á fundi 26.08.2014 tekur Fíggjarnevndin undir við tilmælinum frá Mentanarnevndini, og at peningurin kr. 44.000,- verður tikin av stovninum skúlin.

**Avgerð**
Tilmælini frá Mentanarnevndini og Fíggjarnevndini vóru einmælt samtykt.

**Mál nr. 86/2014 Mentanarmál**
J.nr. 2014-0029-0002
**Málslýsing**
Í skrivi 17. august 2014 spyr borgari í Nes kommunu, um Nes kommuna kann umhugsa av nýggjum at geva børnunum í Nes kommunu ókeypis skúlakoyring til Frískúlan Keldan í Skálafirði.

**Tilmælir**
Á fundi 20.08.2014 mælir Mentanarnevndin frá at stuðla við ókeypis skúlakoyring grundað á, at ongin skúlakoyring er í kommununi.

Á fundi 21.08.2014 tekur Trivnaðarnevndin undir við tilmælinum frá Mentanarnevndini.

**Avgerð**
Tilmælini frá Mentanarnevndini og Trivnaðarnevndini vóru einmælt samtykt.

**Mál nr. 87/2014 Trivnaðarmál**
J.nr. 2012-0031-0132
**Málslýsing**
Kommunurnar við Skálafjørðin hava fingið treytaða góðkenning fyri Samstarvsavtaluna um eldraøkið, og samb. hesi avtalu skulu kommunurnar velja síni umboð til stýrið fyri samstarvinum. Umboðanin í stýrinum er eftir fólkatalinum og fær Nes kommuna tvey umboð.

Borgarstjórin er fastur limur í stýrinum, og skal eitt umboð veljast til stýrið fyri eldraøkið, sum kemur at virka, tá avtalan er endaliga góðkend.

**Tilmælið**
Á fundi 21.08.2014 mælir Trivnaðarnevndin til at velja Elin á Torkilsheyggi, sum umboð til stýrið fyri Skálafjarðasamstarvinum um eldraøkið.

**Avgerð**
Tilmælið frá Trivnaðarnevndini var einmælt samtykt.

**Kunning um fyrra hálvár av roknskapinum fyri 2014 hjá Nes kommunu.**

| **Rakstur** | **1. hálvár** | **Fíggjaræltan** | **munur** | **%** |
|---|---|---|---|---|
| §1 Kommunal fyristingar | 1.930.541 | 3.983.000 | 2.052.459 | 51,5% |
| §2 Almanna- og heilsumál | 2.012.149 | 4.174.000 | 2.161.851 | 51,8% |
| §3 Børn og ung | 4.459.571 | 9.239.000 | 4.779.429 | 51,7% |
| §4 Undirvísing | 1.876.669 | 3.669.000 | 1.792.331 | 48,9% |
| §5 Mentan og frítíð | 1.221.263 | 2.776.000 | 1.554.737 | 56,0% |
| §6 Teknisk mál | 1.234.760 | 2.710.000 | 1.475.240 | 54,4% |
| §7 Kommunal virki | 1.235.989 | 2.895.000 | 1.659.011 | 57,3% |
| **Rakstur í alt** | **13.970.942** | **29.446.000** | **15.475.058** | **52,6%** |
| | | | | |
| §20 Inntøkur v.m. | -15.803.623 | -31.884.000 | -16.080.377 | 50,4% |
| | | | | |
| **Rakstur pr. 30.06.2014** | **-1.832.681** | **-2.438.000** | **-605.319** | **24,8%** |

| **Íløgur** | **1. hálvár** | **Fíggjaræltan** | **munur** | **%** |
|---|---|---|---|---|
| §3 Børn og ung | 44.533 | 100.000 | 55.467 | 55,5% |
| §6 Teknisk mál | 49.237 | 365.000 | 315.763 | 86,5% |
| §7 Kommunal virki | 574.422 | 973.540 | 399.118 | 0,0% |
| **Íløgur í alt** | **668.192** | **1.438.540** | **770.348** | **53,6%** |
| | | | | |
| **Íløgur og rakstur í alt** | **-1.164.489** | **-999.460** | **165.029** | **-16,5%** |